# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingur til B7

Sjúkraøktarfrøðingar søkjast til B7 frá 1. oktober 2007 ella eftir avtalu á starvsbrøki 1,0 í skiftandi vaktum. Møguleiki er fyri lægri brøki:
· eitt fast starv
· eitt avloysarastarv vegna barnsburð til og við 31. mars 2008

Deildin er nýumvæld. Umvælingar á B6 eru byrjaðar, og sjúklingar og starvsfólk á B6 eru flutt á B7 og á E3/E2.
Spennandi avbjóðingar liggja fyri framman, tí THS verður implementerað í heyst.

B7 er ein medisinsk deild, sum tekur móti elektivum og akuttum vaksnum sjúklingum. Deildin hevur vanliga pláss fyri 15 sjúklingum og fer at hava hesar sergreinar:
· apoplexi
· lungamedisin
· nefrologi
· rheumatologi
· onkologi

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**
· røkt og viðgerð til sjúklingar innan áðurnevndu sergreinum

**Krøv til umsøkjaran:**
· prógv og góðkenning sum sjúkrarøktar frøðingur
· fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
· góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
· eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
· fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
· positivt tvørfakligt samarbeiði
· ávirkan á fakliga menning
· góða innleiðslu

Fyrimunir hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Jónu Augustinussen, deildarleiðara á B7, lokal 6067 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, asap@lsh.fo asap@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 17. september 2007 kl. 12.00.

## Sjúkrarøktarfrøðingur til G3, onkologiska ambulatorium

Á onk. amb. G3 er eitt avloysarastarv á starvsbrøki 1,0 leyst at søkja til setan 1. oktober 2007 ella eftir avtalu til og við 30. april 2008. Møguleiki er fyri lægri brøki.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**
· kunna og vegleiða sjúklingar og avvarðandi um krabbamein
· tryggja eina kvalifiseraða viðgerð og eftirkanning av sjúklingum
· samskipa samstarv við aðrar deildir, primer øki og Ríkissjúkrahúsið
· kunna, vegleiða og undirvísa aðrar deildir um røkt og viðgerð av krabbameinssjúklingum
· samskipa viðgerð og eftirkanning hjá krabbameinssjúklingum
· sjálvstøðugar viðtalur
· ráðgeva um linnandi sjúkrarøkt
· geva kemoviðgerðir

**Førleikakrøv:**
· prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
· kemoskeið
· faklig vitan innan økið
· kliniskar royndir innan røkt og viðgerð á økinum
· góð tvørfaklig samstarvsevni
· arbeiða sjálvstøðugt

**Vit kunnu bjóða:**
· eitt fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
· fakliga kompotentar og virknar starvsfelagar
· tvørfakligt samstarv
· fakliga menning

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava:**
· onkologiska eftirútbúgving
· drúgvar kliniskar royndir innan viðgerð og røkt av onkologiskum sjúklingum

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Evu Mortensen, deildarleiðara á G3, lokal 6250 ella til Mariu Debess, onk. amb., lokal 6210.

Umsóknarfreistin er 17. september 2007 kl.12.00.

## Sjúkrarøktarfrøðingur til Føðideildina A2

Á Føðideildini er eitt avloysarastarv leyst at søkja til setan skjótast gjørligt. Starvið er ásett á starvsbrøki 0,7 í skiftandi vaktum.

Føðideildin A2 er ein samansett eind við 5 ymiskum sergreinum.
Málið fyri deildina er at veita viðgerð og røkt til barnakonur og nýfødd børn.
Hetta verður gjørt í tøttum tvørfakligum samstarvi millum fakbólkarnar, sum eru tilknýttir deildini og heilsuskipanini annars.
Deildin er eitt spennandi og mennandi starvsstað við nógvum framtíðar avbjóðingum, tí søkja vit sjúkrarøktarfrøðingar sum hava:
· prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
· góð samstarvsevni
· hug til tvørfakligt samstarv
· ynski um mennandi avbjóðingar
· ynski um ávirkan á fakligu menningina
· kreativitet og fleksibilitet

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Miu Pedersen, deildarleiðara, lokal 5022 ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102.

Umsøknarfreistin er 14. september 2007 kl.12.00

## Læknaskrivara til Bráðdepilin

Ert tú læknaskrivari og hevur hug at arbeiða í einum spennandi og tvørfakligum umhvørvi, so er hetta heilt víst nakað fyri teg.
Á Bráðdeplinum, ið umfatar skaðastovu, akutta móttøku og intensiva deild, umfram journalarkiv, leiðbeining, sjúklingaskrivstovu og sjúkraflutningstænastu, er starv leyst at søkja. Talan er um eitt hálvtíðarstarv til setan 1. oktober 2007 ella eftir avtalu.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi og avbjóðandi starv, har tú kemur at seta tín dám á arbeiðsøkið og saman við verandi læknaskrivara at virka fyri einum høgum tænastustøði.
Upplæring verður givin í teimum telduskipanum, ið verða nýttar.

**Uppgávurnar eru fjølbroyttar, so sum:**
· verða virkin partur av nýggju Talgildu Heilsu Skipanini
· skriva journalir frá intensiv og skaðastovuni
· avgreiða fyrispurningar frá sjúklingum
· ymsar umsitingarligar uppgávur
· verða við til at útbúgva læknaskrivaranæmingar

**Vit ynskja ein læknaskrivari, ið**
· hevur læknaskrivaraútbúgving
· dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
· hevur góð samstarvsevni
· tolir broytingar
· hevur teldukunnleika

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Bodil H. Laksafoss, læknaskrivara, lokal 5801.

Umsóknarfreistin er 19. september 2007 kl. 12.00.

## Reingerðarfólk

Til Reingerðardeildina verður søkt eftir reingerðarfólkum til setan skjótast gjørligt. Talan er um føst størv.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja 304500 til Alvildu Samuelsen, deildarleiðara, lokal 1243.

Ert tú jalig/ur, samstarvshugað/ur, opin fyri menning og broytingum, og hetta er nakað fyri teg, so send eina umsókn innan 6. september 2007 kl. 12.00.

## Onnur Størv (sí meira á www.lsh.fo)

**Pedagogur til Barnadeildina B5**
Umsóknarfreistin er 3. september 2007 kl. 12.00

**Leiðandi læknaskrivari til Skurðdepilin**
Umsóknarfreistin er 19. september 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðfeingisdeildina G1**
Umsóknarfreistin er 9. september 2007 kl. 12.00

**Læknaskrivari til Skurðdepilin**
Umsóknarfreistin er 19. september 2007 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

· er sjúklingurin í miðdeplinum
· eru umleið 200 seingjarpláss
· eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
· eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
· eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
· er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo